# ni við gapandi munni
# ur fiskiskapur

soleiðis: "Spyr(kannað) fyrst, skjót (fiska) aftaná".

Í dag hoyra vit nógv um burðardygd. Tað eru fleiri lýsingar av hugtakinum, men sum heild kan sigast at tilráðingarnar hjá vísindini skulu fylgjast fyri at ein fiskiskapur kann fáa heitið burðardyggur. Grundhugsanin aftanfyri hugtakið er, at einhvør náttúruskipan skal varðveitast soleiðis at tað eisini skal verða møguligt at gagnnýta tilfeingið í framtíðini.

Ein av fleiri felagskapum, sum veita brúkaranum trygd fyri, at vøran er framleidd á einum burðardyggum grundarlag, er MSC (Marine Stewardship Council). Eitt fiskarí, sum nýliga hevur fingið blástempul frá hesum felagsskapi er norski fiskiskapurin eftur upsa í Barentshavinum, sum nógvir føroyingar eru við til at fiska. Fyrimunurin við at hava slíka blástempling, umframt at stovnarnir verða varðveittir, er at betri prísur fæst fyri vøruna.

### Stórar avbjóðingar fyri frammann

Alt hetta vistu forfedrar okkara av góðum grundum ikki, men teir sóu at hesir nýggju reiðskapir vóru so nógvar ferðir effektivari enn nakað, teir nakrantíð høvdu sæð. Í dag eru øll hesi vandamál ein stór avbjóðing hjá fiskivinnuni og harvið samfelagnum sum heild.

Men kanska tann stórsta avbjóðingin kann vísa seg at vera alheims fíggjarkreppan, sum herjar. Fólk hava ikki ráð at keypa fisk, og fiskimenn um allan heim leggja stilt. Lítið man vera at ivast í, at fiskivinnan her á landi fer at uppliva stórar broytingar í komandi tíðum. Hendan kreppan kann hava við sær, at stórir partar av flotanum fara av knóranum. Hetta er tó hent fyrr. Avbjóðingin er at koma sterkari út aftur í hinum endanum.

Fer eftir grunni við gapandi munni, veitir øllum føði uttan sær sjálvum. Hetta var ein gáta, eg lærdi sum barn. Tá var svarið: húkurin, men í dag kann tað líka so væl vera trolið. Hendan gátan hevur helst uppruna í tí tíðini, tá ið húkurin var álitið og teir gomlu, sum á fyrsta sinni sóu trolararnar á grunnunum kendu, hana allarhelst. Ein onnur gáta sum kanska kemur at passa fyri Føroyskan fiskiskap í komandi tíðum er :"Burðardyggur, Umhvørvisvinarligur og Orkusparandi, hvat er tað"??.




**Mynd 2.**
*Veiða í nøgd og virði býtt á reiðskap í 2008. Trolið stendur fyri tí størstu nøgdini, men línan stendur fyri tí størsta virðinum.*

**Mynd 3.**
*Merki hjá MSC (Marine Stewardship Council), ein enskur felagsskapur sum setur treytir fyri hvat burðardyggur fiskiskapur er. Verða krøvini hjá hesum felagsskapi fylgd kann ein fiskiskapur brúka merki hjá teimum.*




**Mynd 4.**
*Teir gomlu í árabátum og nýmótans trolararnir, Vesturvón og Skálaberg. Kontrastirnir eru talandi, vit eru komin langt á hesum økinum, men ansast má eftur.*

## Ofta nýtt hugtøk:

**Fiskidagur:**
Verður roknaður í tímum, frá tí at skipið loysur til tað leggur at landi aftur.

**Veiðutrýst:**
Er eitt tal, fyri hvussu nógv verður tikið burturúr stovninum. Í Føroyum verður ofta % nýtt. 33 % tikið av einum fiskastovni hevur verið nakað sum politikararnir hava hildið verið ráðiligt.

**Veiðuorka:**
Mát fyri, hvussu hart verður fiskað: tal á fiskidøgum, á tímum trolið er úti, á húkum, snellum ella gørnum.

**Burðardygg veiða:**
Í høvuðsheitum skulu tilráðingarnar hjá fiskifrøðini fylgjast fyri at ein fiskiskapur kann fáa heitið burðardyggur. At varðveita tilfeingi til efturtíðina er grundhugsanin í burðardyggari veiðu. Tak ikki meira úr stovninum enn hann klárar at framleiða er grundhugsanin.

**Fyrivarnis reglan:**
Spyr (kannað) fyrst, skjót (Gagnnýt) aftaná. Hendan regla skal helst vera galdandi í øllum viðurskiftum, har ið menniskajan hevur ávirkan á náttúruna.

**Fiskiárið:**
Er frá 1. septembur til 31. august.